# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 08-02-22-51 | Lóg: Skattalógin § 80 | Avgerð tikin: 27.01.2010 |
|---|---|---|

## Mótrokning av avlopsskatti í írestandi skatti og morarentuu


**Samandráttur:**

**Kært er um, at TAKS hevur mótroknað avlopsskatt fyri 2006 í írestandi skatti fyri 2006 og morarentu fyri 2008. Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt at staðfesta avgerðina hjá TAKS við tí grundgeving, at kærarin sambært upplýsingum frá TAKS ikki hevur goldið tann írestandi skattin fyri 2006 sambært fyrstu skattauppgerðini, og at heimild tí er til at mótrokna vísandi til § 80, stk. 3, 3. pkt. í skattalógini. Avlopskattur fyri 2006 kann eisini mótroknast í morarentu fyri 2008 vísandi til § 80, stk. 3, 3. pkt. í skattalógini.**


### Avgerð:

**Kært er um,** at TAKS hevur mótroknað avlopsskatt fyri 2006 í írestandi skatti fyri 2006 og morarentu fyri 2008.

### Kærarin

Kærarin upplýsir, at hann fyrr hevur goldið kr. 67.550 í skatti fyri árið 2006. Hetta var vegna metta inntøku. Tá kærarin síðani sendi sjálvuppgávuna inn, minkaði skatturin nógv, og hann fekk at vita, at hann tá skuldi hava kr. 65.656 endurgoldið.

Fáar dagar seinni fær hann tó eitt skriv, har tað stendur, at hann einki fær endurgoldið, tí hann skyldar kr. 63.283,21 í skatti fyri 2006, og at hetta verður mótroknað tí, sum hann skuldi fáa endurgoldið fyri 2006. Nakrar dagar seinni fær kærarin aftur eitt skriv, har tað stendur, at hann skyldar kr. 3.453,79 fyri árið 2006.

Kærarin meinar, at her er feilur í, og at hann eigur at fáa útgoldið 65.656 kr. sum fráboðað í skattauppgerðini fyri 2006, dagfest 3. oktober 2008.

Sambært brævi frá TAKS dagfest 17. oktober 2008 verður írestandi skattur fyri 2006 á kr. 63.283,21 kr. og morarenta fyri 2008 á kr. 2.372,79 mótroknað í avlopsskatti fyri 2006.

Sambært brævi frá TAKS dagfest 27. oktober 2008 er írestandi skattur fyri 2006 á kr. 3.453,79 fallin til gjaldingar.

### TAKS

Í ummælinum frá TAKS verður upplýst, at kærarin hevur tvær skattauppgerðir fyri skattaárið 2006. Í fyrru uppgerðini er inntøkan mett, og verður endaliga úrslitið ein írestandi skattur, íalt kr. 67.550. Uppgerð og rokning/girokort eru send út í oktober 2007.

Seinna uppgerðin er sambært innlatna sjálvuppgávu, og er endaliga úrslitið ein írestandi skattur, íalt kr. 6.687,43. Uppgerð er send út í oktober 2008.

Seinna uppgerðin tekur hædd fyri áður kravdum írestandi skatti á kr. 67.550 og rentuágóða av ov nógv kravdum skatti (67.550 – 6.584) = 60.966,00 kr.

Tann 17. oktober 2008 verður hendan upphæddin mótroknað, tí kærarin hevur ikki goldið írestandi skattin/rentu frá fyrru uppgerð. Víst verður til § 79, stk. 4 í skattalógini um mótrokning.

Kærarin hevur fingið fráboðanarskriv um eftirstøðuna tann 20. desember 2007, 17. januar 2008, 14. februar 2008 og 17. mars 2008. Tann 2. juli 2008 eru komuboð send út, har hann er biðin at møta tann 9. juli 2008.

Saldo á írestandi skatti 2006 d.d. er kr. 3.091.79. Tað er eykatrekt kr. 1.175,00 til írestandi skattin.

**Kærarin - viðmerkingar til ummælið hjá TAKS**
Kærarin upplýsir, at tað er ikki rætt, at hann ikki hevur goldið skattin fyri 2006, sum TAKS upplýsir sum grundarlag fyri mótrokningini.

Hann hevur goldið skattin fyri 2004, 2005 og 2006 í trimum flytingum. 14. juni 2007 flutti hann kr. 23.000. Tann 25. juni 2007 flutti hann kr. 22.599, og tann 22. juli 2008 flutti hann kr. 91.044,16. Tann seinasta flytingin er allur skatturin fyri 2006 og restin frá 2004 og 2005.

Hesar flytingar vórðu gjørdar í avtalu við P, pantifúta. Avrit av bankakonto er viðlagt sum skjalprógv fyri flytingunum.

Kærarin meinar, at hann eigur at fáa kr. 65.656 og galdandi rentu fram til útgjaldsdagin.

**TAKS - viðmerkingar til seinastu viðmerkingar frá kæraranum.**
TAKS viðmerkir í brævi frá 7. desember 2009, at flytingarnar hjá kæraranum, sum sipað verður til í brævinum frá 13. februar 2009, ikki vóru fyri 2004, 2005 og 2006, men bert fyri 2004 og 2005. Fyrsta uppgerðin fyri 2006 fór ikki út fyrr enn 8. oktober 2007, og fyrsta girokortið fall til gjaldingar tann 20. november 2007. P vísir eisini aftur, at hon hevur gjørt nakra avtalu um hetta. Upplýst verður eisini, at mótrokningin fór fram tann 17. august 2008.

**Avgerð frá Skatta- og avgjaldskærunevndini.**
§ 79, stk. 4, 3. pkt. í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt ásetir, at um avlopsskattur er, verður møgulig eftirstøða av persónligum skatti við tilskrivaðum rentum mótroknað í avlopsskatti, áðrenn afturgjalding fer fram.

Um ein broyting verður gjørd aftaná 1. mai í álíkningarárinum í einari endaligari álíkning, og hetta hevur við sær, at írestandi skattur skal gjaldast, ella at írestandi skattur verður hækkaður, ásetir § 80, stk. 3, 3. pkt., at áðrenn útgjalding verða møgulig gjøld av írestandi skatti, sum ikki eru fallin til gjaldingar eftir § 78 og møguligar eftirstøður av persónligum skatti við tilskrivaðum rentum, mótroknað.

Um ein broytt endalig álíkning, sum er gjørd aftaná 1. mai í líkningarárinum, gevur tað úrslit, at avlopsskattur skal gjaldast tí skattskylduga, ella at meira avlopsskattur enn frammanundan roknað skal afturgjaldast, ásetir § 80, stk. 4, 2. pkt., at áðrenn afturgjalding verða møgulig gjøld av írestandi skatti, sum ikki eru fallin til gjaldingar eftir § 78 og møguligar eftirstøður av persónligum skatti og tilskrivaðar rentur, mótroknaðar.

Sambært brævi frá TAKS dagfest 17. oktober 2008 hevur TAKS mótroknað avslopsskatt frá 2006 í írestandi skatti fyri 2006 á kr. 63.283,21 og í morarentu fyri 2008 á kr. 2.372,79.

Viðvíkjandi mótrokningini av avlopsskatti frá 2006 í írestandi skatti fyri 2006 er støðan tann, at kærarin sambært fyrstu uppgerð skal gjalda kr. 67.550, og hendan uppgerðin er grundað á met. Seinni verður sjálvuppgáva innlatin, og nýggj uppgerð gjørd. Hendan vísir ein írestandi skatt á kr. 6.687,43, og kr. 65.656 skulu gjaldast út, tí skipanin íroknar, at kærarin hevur goldið tær kr. 67.550 sambært fyrstu uppgerðini.

§ 80, stk. 3, 3. pkt. í skattalógini fevnir um ta støðu, at ein endalig álíkning eftir 1. mai verður broytt, soleiðis at áður útroknaður írestandi skattur verður lækkaður ella fellur burtur. Áðrenn útgjalding verða møgulig gjøld av írestandi skatti, sum ikki eru fallin til gjaldingar eftir § 78 og møguligar eftirstøður av persónligum skatti við tilskrivaðum rentum, mótroknaði.

TAKS vísir til § 79, stk. 4, 3. pkt. sum heimild fyri mótrokningini. Orsøkin til hetta er møguliga, at fyrsta skattauppgerðin er gjørd grundað met. Talan er tó ikki um eina fyribils skattauppgerð, men um eina endaliga skattauppgerð, sum er grundað á met. Heimildin at mótrokna má tí vera í § 80, stk. 3 og ikki í § 79, stk. 4.

Tað kann setast spurnartekin við, um tað at frádraga írestandi skatt, sum ikki er fallin til gjaldingar ella ikki er skyldugur og goldin, kann kallast mótrokning, tí mótrokning grundleggjandi er fortreytað av, at partarnir hava krøv móti hvørjum øðrum, sum kunnu mótroknast. Hetta er tó ivaleyst fevnt av hesi grein og verður kallað mótrokning.

Kærarin førir fram, at hann eigur at fáa kr. 65.656 og galdandi rentu fram til útgjaldsdagin, tí hann hevur goldið hendan skattin, sum hann er uppgjørdur í fyrstu skattauppgerðini. Kærarin upplýsir, at hann hevur goldið skattin fyri 2004, 2005 og 2006 í trimum flytingum. Tann 14. juni 2007 flutti hann kr. 23.000. Tann 25. juni 2007 flutti hann kr. 22.599, og tann 22. juli 2008 flutti hann kr. 91.044,16. Tann seinasta flytingin er allur skatturin fyri 2006 og restin frá 2004 og 2005. Hesar flytingar vórðu gjørdar í avtalu við P, pantifúta. Avrit av bankakonto er viðlagt sum skjalprógv fyri flytingunum.

Til hetta viðmerkir TAKS, at flytingarnar hjá kæraranum, sum sipað verður til í brævinum frá 13. februar 2009, ikki vóru fyri 2004, 2005 og 2006, men bert fyri 2004 og 2005.

Kærarin hevur onga viðmerking til hetta, og støðan má tí metast at vera tann, at kærarin ikki hevur goldið tann írestandi skattin fyri 2006 sambært fyrstu skattauppgerðini.

Tá kærarin ikki hevur goldið hendan skattin, kann hesin mótroknast vísandi til § 80, stk. 3 í skattalógini.

Viðvíkjandi mótrokningini av morarentu fyri 2008 á kr. 2.372,79 skal viðmerkjast, at hendan mótrokning eisini hevur heimild í § 80, stk. 3, 3. pkt. í skattalógini.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt at staðfesta avgerðina hjá TAKS við tí grundgeving, at kærarin sambært upplýsingum frá TAKS ikki hevur goldið tann írestandi skattin fyri 2006 sambært fyrstu skattauppgerðini, og at heimild tí er til at mótrokna vísandi til § 80, stk. 3, 3. pkt. í skattalógini. Avlopskattur fyri 2006 kann eisini mótroknast í morarentu fyri 2008 vísandi til § 80, stk. 3, 3. pkt. í skattalógini.**

Viðmerkjast skal at enda, at tað fyrisitingarliga er sera óheppið, at avgerðin hjá TAKS um mótrokning ikki vísir til heimild fyri hesi mótrokning og annars heldur ikki er grundgivin, soleiðis at kærarin hevur møguleika at skilja avgerðina. Avgerðin lýkur tí ikki tey krøv, sum eru til avgerðina, eftir fyrisitingarlógini.